# Læraravegleiðing




Bókadeild Føroya Lærarafelags



# Hvussu basa vit happing?

Dámar „Hata horuna“ varð til í einum samstarvi millum Johanne Nilsson, Pocketförlaget og Friends. Johanne Nilsson er svenskur rithøvundur, sum hevur givið bókina út á Pocketförlaget, og Friends er ein felagskapur, hvørs uppgáva er at steðga happing. Í Friends stuðla tey skúlum og ítróttafeløgum við ráðgeving og tilfari, sum skal steðga happing. Friends hevur eina heimasíðu, sum eitur www.friends.se, har ein rúgva av kunning fæst um happing.

Ætlanin við bókini er, at tann, sum lesur, skal kenna seg ávirkaðan, uppøstan og fáa íblástur til at stríðast ímóti ágangi og ljótum málbrúki. Um tað fer fram á Facebook, skúlavesinum, í umklæðingarrúminum ella í fartelefonini ger ongan mun fyri tann, sum stendur fyri skotum. Við at venda tær ímóti happing kanst tú broyta lívið hjá einum øðrum menniskja.

Bókin vekir nógvar kenslur og tankar í okkum. Tí hava tey á Friends gjørt hesa læraravegleiðingina fyri at stuðla upp undir orðaskiftið, sum kann fara fram í 9.-10. flokki ella í miðnámi. Endamálið er at gera tað lættari at tosa um ágang á netinum og í skúlanum við støði í bókini. Hetta er eisini orsøkin til, at Bókadeildin í sambandi við útgávuna hevur valt at týða læraravegleiðingina til føroyskt.




*Vit vóna, at nógv spennandi orðaskifti spyrjast burtur úr hesi bókini!*

© Stiftelsen Friends 2012
© Føroyska útgávan: Bókadeild Føroya Lærarafelags 2013
Ábyrgd fyri útgávuni: Lars Arrhenius
Tekstur: Carolina Engström
Marna Jacobsen týddi úr svenskum
Tilevnað: Isak Arvidsson

*Tilfarið er ókeypis og kann avritast og verða brúkt í skúlunum*

# Soleiðis brúkar tú læraravegleiðingina

Brúka hana sum stuðul í undirvísingini fyri at koma betur inn í evnini í bókini: happing á netinum, vinalag, tøgn og leiklutin sum áskoðari. Bókin kann eisini brúkast í einum arbeiðsbólki/evnisbólki fyri at fáa meira kunnleika um ágang á netinum. Á Friends møta tey ofta lærarum, foreldrum og leiðarum, sum arbeiða við tannáringum, og sum standa hjálparleys og vita ikki, hvat tey skulu gera við happing á netinum. Friends fær nógvar spurningar um, hvør hevur ábyrgdina av at fyribyrgja, hvussu tosast kann við ung um, hvat hendir á netinum, hvat er at gera, tá ið eins egna barn er útsett, um tað ber til at steðga myndum, sum verða spjaddar á netinum og mangt annað. Brúka bókina og læraravegleiðingina sum stuðul fyri at koma víðari í hesum týdningarmikla evni.







Í Føroyum hava vit eitt dátueftirlit, har til ber at fáa kunning um trygga ferðslu á netinum, har finst eisini tilfar, sum skúlar kunnu brúka, og tey koma fegin út á skúlar og aðrastaðni at greiða frá um evnið.

Sambært kanning frá 2010 hjá Dátueftirlitinum, hava 53% av næmingunum í 3. flokki og 73% av næmingunum í 4. flokki vangamynd á Facebook.

Kanningin vísir eisini, at 17% av næmingunum í 3. flokki og 39% í 4. flokki leggja myndir ella filmar út á netið.

30% av næmingunum í 3. flokki og 23% í 4. flokki leggja myndir ella filmar av øðrum fólkum út á netið uttan at spyrja um loyvi.

(úr bóklinginum Tað er tín avgerð 2, 2010)

Dátueftirlitið hevur hesa heimasíðuna: www.dat.fo

# Dámar „Hata horuna“ – læraravegleiðing

Bókin er um Jonnu og Gloriu, sum eru 15 ára gamlar og bestu vinkonur. Tær eru ikki serliga populerar, verða tó ikki happaðar, men sleppa at ganga í frið. Ein dagin fara tær í veitslu og sleppa at dansa við Robin, kulasta dronginum í skúlanum, sum tykist halda tær vera heilt ókey, ja kanska enntá fittar. Tað er næstan ov gott at vera satt, og tað er tað heldur ikki. Ljótar viðmerkingar byrja at koma inn á bloggin hjá Gloriu, og á Facebook verður gjørdur ein bólkur, sum eitur Hata horuna. Gloria fær so ilt av hesum, at hon fer aftur at skera seg. Jonna má gera okkurt og ger av at geva aftur av somu skuffu, tí á netinum kann alt henda.

Kjakspurningarnir eru býttir upp í evni úr ymsum sjónarhornum: Jonna, Robin og Gloria. Haraftrat verður nortið við leiklutin hjá áskoðaranum, netið sum leikpall og ábyrgdina hjá tí vaksna. Vel spurningar, sum hóska best til tín flokk alt eftir støðuni í flokkinum og teirra tørv. Spurningarnir kunnu brúkast í smáum bólkum ella í flokkinum sum heild, teir kunnu eisini verða svaraðir skrivliga sum ein innlatingaruppgáva í føroyskum.

Ung í framhaldseild og miðnámi kenna seg væl aftur í søgugongdini í bókini. Orðaskiftið um søgugongdina kann lættliga gerast til eitt orðaskifti um teirra egna veruleika her og nú. Fyri at orðaskiftið ikki skal gerast ov privat ella fáa næmingarnar at kenna seg illa, hevur tað týdning at gera sær greitt, hvørjir spurningar hóska til eitt orðaskifti, og hvørjir hóska betur til eina skrivliga uppgávu. Tú kennir næmingarnar best og veitst, hvat riggar best í tínum flokki.

## Jonna

Fyrsti persónurin, vit fylgja í bókini, er Jonna. Tað er hon, sum byrjar bólkin Hata horuna 2 og setur søgur í gongd um Robin.

**Spurningar:**

- Hví byrjar Jonna ”Hata horuna 2”?
- Hví halda tit, at hon seinni í bókini verður vinur við Robin?
- Hví valdi Jonna at fyrigeva Robin?
- Hvat meinar Jonna við, at maktin etur Gloriu upp, at hatur er sum eitt stórt skrímsl, sum etur alt ljós?
- Um tit vóru Jonna, hvat høvdu tit so gjørt?
- Eru aðrir mátar at steðga happing og slatri á netinum enn tann mátin, Jonna velur?

## Robin

Tann væl umtókti drongurin í flokkinum fær gentur at lata seg úr og senda honum myndir. Robin er tann, sum eggjar til og fremur neyðtøkuna av Gloriu í veitsluni.

**Spurningar:**

- Hvat hendir í veitsluni?
- Er Robin errin av tí, hann hevur gjørt móti Gloriu?
- Hvussu ávirkast Robin av søgunum, sum verða fortaldar um hann?
- Hvat hevði tú gjørt, um hetta hendi tær ella onkrum, tú kennir?
- Er Robin offur ella tann, ið fremur brotsgerð?
- Hvat hendir við Robin at enda?



## Gloria

Gloria er gentan, sum droymir um at gerast sjónleikari, hon bloggar, og hon er sambært Jonnu: „so vøkur at tað svíður í eygunum“. Gloria verður neyðtikin í veitsluni og verður síðan útsett fyri øgiligum slatri í bólkinum „Hata horuna“, sum verður gjørdur aftaná.

**Spurningar:**

- Hvussu broytist Gloria av neyðtøkuni og av happingini aftaná? Hví halda tit, hon ger tað?
- Gloria sker seg sjálva, hví ger hon tað?
- Er Gloria offur ella tann, ið fremur brotsgerð?
- Hví halda tit, at hon ger seg inn á Robin, t.d. inni á vesinum?

## Øll rundanum

Bókin snýr seg um Jonnu, Robin og Gloriu, men rundan um tey er ein rúgva av persónum, sum hava týdning fyri søgugongdina og tað, sum fer at henda. Uppgávan niðanfyri er ein einføld venjing í at greina áskoðaraleiklutin, og hvat tú kanst gera, tá ið tú sært ágang á netinum.

**Gerið soleiðis**: Být flokkin sundur í tríggjar bólkar. Lat hvønn bólk arbeiða við einum av teimum trimum pørtunum, Jonnu, Gloriu og Robin. Finn útav, hvussu nógvir aðrir persónar verða nevndir í bókini, í skúlanum, uttan fyri skúlan og á netinum. Lat bólkarnar hugsa um, hvørjir hesir persónarnir eru, og hvønn leiklut teir hava fyri søgugongdina. Samanber svarini í bólkinum í flokkinum.

**Tosið síðan um:** Hvussu kunnu tey, sum eru rundanum, ávirka tað, sum hendir í bókini? Hvussu stóran leiklut hava hesir persónarnir fyri søgugongdina? Hvussu kunnu tey, sum standa við síðuna av (áskoðararnir) steðga óndum slatri og happing á netinum, t.d. á Facebook? Hvat kunnu tey í flokkinum gera? Hvat kunnu tey vaksnu í skúlanum gera? Hvat kunnu foreldrini hjá Jonnu, Gloriu og Robin gera fyri at finna finna útav, hvat gongur fyri seg?

## Hvar er títt mark á netinum?

Lat næmingarnar meta um fylgjandi spurningar, í bólkum ella skrivliga:

**Senda myndir** – til hvønn og hvussuleiðis? Hvat plagar tú at hugsa um, tá ið tú sendir øðrum myndir av tær sjálvari/sjálvum. Hvørjir vandar kunnu vera við at senda ella leggja myndir inn á netið? Hvørjir fyrimunir eru?

**Avleiðingar** – hvat hendir við tí, vit skriva á netinum? Og hvussu ávirka vit tey, sum lesa tað, vit hava skrivað? Hava vit ábyrgd av tí, sum vit skriva anonymt? Um ja, hvør er ábyrgdin? Hvat plagar tú at hugsa um, tá ið tú sjálv/ur skrivar viðmerkingar á netinum t.d í bloggar ella skrivar í kjaktræðrum? Hevur tú upplivað at fáa ljótar viðmerkingar? Hvussu gert tú tá? Tosið um, hvørjar royndir tit hava, og gevið hvør øðrum góð ráð um, hvussu ljótar viðmerkingar á netinum kunnu basast.

„Eg sendi honum eina vinarumbøn og væntaði sjálvandi, at hann fór ikki at svara, men tað gjørdi hann. Hann vildi hava meg at senda nakrar myndir av mær sjálvari, og tað gjørdi eg, og so bleiv eg vinur hansara.“

# Uppgáva: preilistin

Hvat skal mann gera, um mann er fyri ágangi á netinum? Er nakar í skúlanum, sum ansar eftir trygd á netinum? Hvørjar reglur fyri trivnaði eiga vit í flokkinum at hava, tá ið tað snýr seg um ferðslu á netinum. Henda venjingin gevur flokkinum møguleika at práta um, hvat mann eigur at gera um mann sjálv/ur verður fyri ágangi á netinum, hvar mann skal venda sær og so framvegis.

**Tilfar:** Bólkarnir skulu hava pappír og penn, og eitt størri pappír ella eina teldu til endaliga preilistan.

**Soleiðis gert tú**: Být flokkin sundur í 5-8 bólkar. Gev hvørjum bólki pappír og penn og bið tey kjakast og skriva niður tað, tey halda, eigur at verða gjørt, um mann sær ella verður fyri ágangi á netinum. Bið tey skriva niður alt tað, tey koma í tankar um. Gev bólkunum umleið 10 minuttir at kjakast.

Tá ið tey er liðug, kann hvør bólkur leggja tað fram, sum tey hava kjakast um. Ger ein samandrátt av tí, flokkurin er komin fram til. Ein listi kann t.d. síggja soleiðis út, sum hesin niðanfyri:

1. **Melda ágangin til trygdardeildina hjá síðuni/portalinum.**
2. **Tosa við onkran í skúlanum um tað, sum er hent.**
3. **Goym sms, teldupost ella ger eitt ”print screen” av áganginum – tað er eitt týðandi prógv!**
4. **Ikki dáma ljótar viðmerkingar – tað er næstan tað sama sum, at tú sjálv/ur hevur sagt tað!**
5. **Um tú torir – mótmæl einari ljótari viðmerking!**
6. **Gev hvør øðrum góðar viðmerkingar.**

# Til arbeiðsbólkin/ evnislærarabólkin

Skiftið orð um vaksnamannaheimin, sum hann verður lýstur í bókini, sum vaksin, ið ikki fylgja við og taka ábyrgd av sínum børnum og tí, sum fyriferst. Jonna, Gloria og Robin møta vaksnum, sum ikki síggja ella hoyra nakað; vaksnum, sum eru so upptikin av sínum egna lívi, at tey ikki makta at møta teimum ungu. Kenna tit tykkum aftur, eru næmingar á tykkara skúla, sum hava somu royndir sum Jonna, Gloria og Robin? Hvussu kann skúlin varnast hesar útsettu næmingarnar? Hvat kunnu vit læra av tí, sum hendir í bókini? Hvat høvdu tit sjálv gjørt, um tað hendi á tykkara skúla?



„Hon var nýggj í flokkinum, var flutt higar úr Knivsta, og tí at allir bólkar vóru fullmannaðir, var hon til avlops.

Júst sum eg eri til avlops.

Júst sum allir aðrir skuggar, sum strúka fram við veggjunum og vóna, at eingin skal leggja merki til teirra og velja teir til ársins syndabukk. Tá kann ganga illa. Tá kann ein fáa eina takkling hvørja løtu, ella høvdið verður trýst niður í onkra vesikummu og togað verður niður, ella so má ein gjalda fyri ikki at verða bukað, og ein kann ongantíð vera vís í, at súkklan ikki er punkterað, og ein kann ikki sita í bussinum, líka mikið hvussu nógv leys pláss eru, og ein má heilt vist sita einsamøll í matstovuni (um ein ikki vil sita saman við teimum frá spesialskúlanum, sjálvandi), og ein kann ongantíð dansa í skúlaveitslum.

Sostatt einki stuttligt.“

(s. 13 úr Dámar „Hata horuna“)



**DÁMAR „HATA HORUNA“**
er ein sterk ungdómssøga um happing á netinum. Um hvussu skjótt ein søga kann gerast til slatur og spjaðast. Um hvussu lættliga bøðilin kann gerast offur og øvut.

Dámar „Hata horuna“ var til í samstarvi millum Johanna Nilsson, Pocketförlaget og Friends.

ISBN 978-99972-0-035-8

Bókadeild Føroya Lærarafelags